# Eingin skuld

HEÐIN MORTENSEN
borgarstjóri



Uttan mun til, hvat Jan Christiansen og onnur siga og skriva um skuld og skuldarbinding av Tórshavnar kommunu, kann eg sum borgarstjóri vátta, at kommunan hevur onga nettoskuld.

Og at eg havi ongar ætlanir at skuldarbinda kommununa, men veit ikki, um Jan Christiansen og onnur kanska hava ætlanir um at gera tað?

Eg vil tí sláa fast, at tað verður ikki við mær, at skuldarbinding av Tórshavnar kommunu vinnur frama.

# Framskygni!!!

SJÚRÐUR V. JOHANNESEN
Valevni á lista C



**Verði eg partur av komandi býráð í Tórshavnar kommunu, fari eg at arbeiða fyri at hyggja frameftir, og fyrireika kommunu og umsiting uppá, at broytingartíð er á veg**

Kommunan skal millum annað fyrireikast til, at tað eru óvanliga nógv børn, ið eru merkt av, at foreldrini eru farin hvør til sítt seinastu árini.

*Í minum hugaheimi merkir tað, at vit fáa ein árgang av børnum og ungum, ið hava ein annan tørv og møguliga skulu stuðlast og hjálpast. Um tað verður betur ella verri, er torført at spáa um, men ongin ivi er um, at tað verður annarleiðis.*

Vit vita at rúsevni er ein vaksandi trupulleiki millum ung, her eigur kommunan at ganga á odda við fyribyrging.

*Havi hugsa, at náttarravnarnir møguliga kundu verið ein partur av hesi fyribyrging, við at kommunan stuðlaði við fakligari uppkvalifisering.*

Tíanverri er tað so, at stórur vandi er fyri at fleiri borgarar í Tórshavnar kommunu fara at hava ilt við at svara hvørjum sítt um so er at annar til dømis missir arbeiðið. Feskt dømi er Føroya Tele.

*Her er neyðugt at vita at orka skal setast av til at stuðla og hjálpa teimum familjum ið koma í hesa ólukkuligu støðu.*

Hetta er ikki fyri at mála ein vissan á veggin, men tað stendur sólarklárt, at ein broyting er á veg. Vónandi fer tað at ganga tann rætta vegin skjótt aftur, men vit vera noydd at hugsa klárt og vera framskygd '**betur fyrivarin enn eftirsnarin**.'

# Útbúgving

FRANK JACOBSEN



Eitt náttúrligt samfelag er áhaldandi í menning. Í dag taka vit ting fyri givið, sum vóru marglæti fyri einans 20 árum síðan. Hetta vísir okkum, at neyðugt er alla tíðina at laga seg til tíðina.

Á øllum arbeiðsplássum verður tað mett sum ein náttúrligur rættur, at hava eitt matstað, har ein kann sita og eta sín matpakka. So er ikki í skúlunum. Hóast tað er í fólkaskúlanum, at grundarlagið fyri framtíð barnanna verður formað, so hava næmingarnir á flestu skúlum í kommununi ikki henda rætt. Næmingarnir sita í skúlastovuni og eta sín matpakka. Hetta er ikki nøktandi. Tí mugu allir skúlar, sum ikki hava eitt matstað, lagast til tíðina.

Ein skipan við heilsugóðum kosti eigur at vera ein náttúrligur partur av skúladegnum. Fyrsta stig á hesi leið, er at skipa so fyri, at øllum næmingum stendur í boði at fáa frukt og grønmeti.

Útbúgving er grundarlagið fyri allari menning. Fyri at læra, má ein trívast og kenna seg tryggan. Júst tí vil eg arbeiða fyri, at bæði næmingar og lærarar fáa góðar og nútímans karmar at arbeiða innan fyri.

Vilt tú hava ein, sum lurtar eftir tær? Vilt tú hava ein, sum arbeiðir fyri teg? So vel meg!

Tú finnur meg á lista H.

# Skúlar og Eldrasambýlir

OSKAR EIRIKSSON



Nú tað stundar til býráðsval 2008 og vit skulu velja nýtt býráð, kundi eg hugsað mær at trivið í spurningin um at fáa fleiri skúlar og eldrasambýlir.

Eg meini at hetta skal hava fyrsta prioritet, fýra tey næstu árini.

Tvey tey fyrstu árini í komandi setu, fara nokk við teimum protiektum, sum verandi samgonga hevur sett út í kortið, her hugsi serstakulia um skúlan í Hoyvík og á Argjum.

Um tvey ár, tað vil siga, 2011 eru skúlin í Hoyvík og á Argjum lidnir og børnini á Argjum eru farin í tann nýggja skúlan. Tá stendur verandi skúli tómur. Tórshavnar komuna skal tá ígongd við eldrasambylið úti við Strond. Her kundi eg hugsað mær at núverandi skúlin á Argjum bleiv umbygdur og reneveraur til eitt eldrasambyli.

Á núverandi skúla eru umstøðurnar sera góðar, godt umhvørvi, vi góðum útsýni yvir ta deiligu Havn og lívið har er, so hevur skúlin baði svimjihyl og fimleikahøll at styrkja tey gomlu. Hetta eldrasambylið skuldi fyrst og fremst verið fyri brúkarar av Argjum, Kirkjubø, Velbastað, Syradali og Norðadali. Tann gamli skúlin kundi verið brúktur til 10 flokk, sum longu í næsta ár hava trupuleikar við hølisviðurskiftum.

X við Fólkaflokkin listi A

# Liðugt við umberingunum fyri okkara eldru!

JÁKUP SÍMUN SIMONSEN
Valevni hjá Tjóðveldi til Tórshavnar býráð



**Rættindini hjá okkara eldru til røktarheim, sambýli ella hjálp í egnum heimi, hava í mong ár verið ein endaleys røð av umberingum. Nú skera vit ígjøgnum og taka ábyrgdina!**

Tað hevur verið sum at sæð ein flogbóltsdyst at fylgt gongdini at útvega okkara eldru virðilig tilboð til ellis- og røktarheim, sambýli ella hjálp í egnum heimi: Hvørja ferð hetta so týdningarmikla mál verður tikið upp, verður tað sligið yvirum netið ella smasjað niður í gólvið í einum endaleysum dysti millum land og kommunur.

Men nú má vera liðugt við umberingunum! Sum størsta kommuna í landinum skal Tórshavnar kommuna ganga undan at taka yvir alla ábyrgdina av trivnaðinum hjá okkara eldru. Hetta eigur at vera ein av kjarnuøkinum í eini kommunu og millum okkara fremstu skyldur, sum býráðspolitikarar.

Eg kenni til tað ovurstóra arbeiðið, ið dugnalig fólk hava gjørt innan eldratilboðini, hóast ábyrgdin verður blakað ímillum tveir politiskar myndugleikar. Og eg kenni til óvirðiligu umstøðurnar, bíðitíðina og ta ábyrgd, ið familjurnar taka, tá myndugleikarnir renna undan.

Saman við Tjóðveldi og býráðnum øllum fari eg at tryggja, at ábyrgdin kemur á okkara hendur og at vit seta ferð á verulig tilboð til okkara eldru.

Tað eru bara Tú og E, ið kunnu fáa nakað at henda.

# Menningarætlan gerðast fyri Runavíkar kommunu

KLÆMINT ØSTERØ
Valevni á lista B, til Runavíkar býráð



"Runavíkar kommuna, ein kommuna í menning" er slagorið hjá kommununi, men ongin ítøkilig menningarætlan er gjørd fyri, hvussu kommunan framhaldandi skal mennast.

"Runavíkar kommuna, ein kommuna í menning" Soleiðis ynskja tey flestu eisini at tað skal verða, men tað er uppgávan hjá býráðnum at syrgja fyri at kommunan er í støðugari menning.

Ongin ítøkilig ætlan er gjørd fyri, hvussu kommunan skal mennast og hvørjum visiónum stýrt verður eftir. Úrslitið er, at alt ov stórur munur er á gongdini í kommununi, alt eftir hvør politiski viljin er, og umsitingin hevur onki ítøkiligt grundarlag at halda seg til.

Skal kommunan framhaldandi mennast verður neyðugt at gerða eina menningarætlan fyri øll fyrisitingarligu økini, skúlarnar, stovnarnar, kommunalu virkini, ítróttin, frítíðar-, og vinnumøguleikarnar sum eru í kommununi.

Menningarætlanin skal verða ítøkilig og skal kunna nýtast sum eitt amboð at stýra eftir, fleiri ár fram. Menningarætlanin fer at leggja eitt grundarstøði sum tryggjar eina javna menning á øllum økjum, og ger tað lættari at raðfesta íløgur, serliga tær sum strekkja seg yvir ár.

Menningarætlanin er ein fortreyt fyri, at fleiri av teimum stóru verkætlanunum kunnu fremjast í verki. Eitt nú verkætlanin um ítróttardepilin við svimjihyli v.m.

# Vágur minkar

FRÍÐGERÐ MIDJORD,
sjúkrarøktarfrøðingur, Valevni á Uttanflokkalistanum í Vági, listi A



Tey feskastu tíðindini í morgun 4. oktober eru, at Føroya Banki hevur niðurlagt deildina í Vági. Hetta eru enn eini skelkandi tíðindi, og ein meirútreiðsla fyri viðskiftafólk bankans at fara á Tvøroyri fyri at greiða síni bankaviðurskifti.

Okur, sum trúðu, at nú var ikki meira at flyta úr Vági, mugu staðfesta, at enn ein stovnur er fluttur úr bygdini, til miklan skaða, eisini fyri tey, ið her hava sítt dagliga arbeiði. Eftir stendur spurningurin, hví flytur bankin??? Tað fyrsta ein kemur í tankar um er, at Suðuroy ikki er ein kommuna, tí umso var, so hevði verið møguligt at vart seg við forhandlingum. Sum nú er, eru tvær stórar kommunur og okkara fólk hava ikki duga at forhandla seg til úrslit, fyri at bjarga tí sum eftir er.

Eitt kunnu okur so staðfesta, at higartil er bygdin bara tømd fyri skrivstovur og almenna fyrisiting, so lítil dugur er í ikki at samstarva og vera í einari kommunu. Tann næsta flytingin verður kanska posthúsið?

Okkum er eisini komið fyri oyru, at Føroya Banki hevur biðið Vágs Býráð um at gera parkeringsøkið framman fyri bankan liðugt, men uttan úrslit og eisini at taka sær av tí húsaleivd, ið liggur aftan fyri bankan, men býráðið letur ikki við seg koma.

Til seinast vil eg heita á vágbingar um at velja Uttanflokkalistan, set krossin við lista A.

www.uttanflokkalistin.dk

